# Framferðin hjá Jacob Vestergaard er lívshættislig



*Tórbjørn Jacobsen bíðar eftir, hvat løgmaður ger við Jacob vestergaard, men hendir onki, fer hann sjálvur víðari við málinum*

**- Málið um skiparnar á Smyrli verður lagt fyri landsstýrismálanevndina, tí tað má kannast til botns, sigur Tórbjørn Jacobsen, næstformaður í Tjóðveldinum**

STARVSSETAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Málið um at seta skiparar á Smyrli skal leggjast fyri Landsstýrismálanevndina.

Tað staðfestir Tórbjørn Jacobsen, næstformaður í Tjóðveldinum.

Og tað ætlar hann sær sjálvur at syrgja fyri.

Hann sigur, at tað einasta, sum kann forða fyri, at málið verður lagt fyri landsstýrismálanevndina, er, at løgmaður tekur støðu í málinum áðrenn.

Tórbjørn Jacobsen heldur, at framferðin, sum landsstýrismaðurin hevur víst í hesum máli, er lívshættislig.

- Seinastu árini hevur tað verið eitt standandi stríð fyri at fáa politiska valdið at halda seg burturfrá at leggja seg út í, hvussu almennir stovnar verða stýrdir.

- Men kemur glið á einastaðni, er vandi fyri, at glið kemur á alla aðrastaðni.

Tórbjørn Jacobsen heldur, at eitt stórt ivamál, sum eigur at verða kannað, er, um Jacob Vestergaard hevur rætt í tí, at tað er innlendismálaráðið, sum er kærustovnur, tí tað er við hesi grundgeving, at hann hevur lagt seg út í málið.

- Men hevur Jacob Vestergaard beinleiðis lagt seg út í viðurskiftini á einum almennum stovni, er tað eitt álvarsmál.

- Sleppur hetta at ganga, er slóðað fyri, at landsstýrismenn fáa frítt slag at áleggja stovnsleiðarum, hvørji fólk, teir skulu seta í starv.

- Tí er tað ómetaliga týdningarmikið, at mørkini ikki vera brotin, men er tað hent í hesum føri, er landsstýrismaðurin farin langt út um mark, sigur næstformaðurin í Tjóðveldinum.




**PARTABRØV HILDU FRAM AT LÆKKA**

Evropisk partabrøv lækkaðu 3% í farnu viku. Hetta er triðja vika á rað, at partabrøv eru lækkaði og er tað ein samlað lækking uppá 7,25%. Orsøkin er framhaldandi spekulatión um tap uppá tey sokallaðu sub-prime lánini. Hesuferð vóru tað bankarnir Barclays og USB sum væntaðu sær fleiri tap av kreppuni.

**GÓÐ TÍÐINDIR FRÁ FAROE PETROLEUM**

Faroe Petroleum sum rakti við gass í Breaghbrunninum fyri nøkrum vikum síðan, boðaði mánamorgunin frá, at royndarframleiðslan av brunninum er liðug. Fyrstu úrslitini síggja sera lovandi út. Herumframt er sannlíkindini stór fyri, at gass eisini finnst í blokki 42, sum liggur tætt upp at Breaghbrunninum. Seinasta greiningin av Faroe Petroleum, sum var gjørd áðrenn tíðindini, metti felagið at hava eitt kursvirði uppá 260, sum er 65% hægri enn dagsvirði.

Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum kom út við einum heldur slakari roknskapi enn mett. Kursurin lækkaði 35%. Mánadagin hækkaði kursurin 16,50% aftur, tó uttan nøkur tíðindir. Møguliga vilja íleggjarar gera sær dælt av kurslækkingini og keypa. Hetta kann fáa kursin at hækka.

**ATLANTIC AIRWAYS ÁHUGAVERT**

33% av Atlantic Airways verða einskild í hesum døgum. Tekningarkursurin fer at liggja á 242-262. Vit meta at felagið hevur eitt virði uppá umleið 300 mió kr, svarandi til at ein avsláttur uppa áleið 15% er givin við tekningarkursinum. Vit mæla íleggjarum til at keypa. Nærri greining av felagnum finnst á kaupthing.fo.

**RENTUR LÆKKA**

Aftur hesa vikuna lækkaðu renturnar nakað. 10-ára danska lánsbrævarentan liggur ídag á 4,15%, sum er 0,05% lægri enn fyri viku síðan.

**HESA VIKUNA**

Hesa vikuna fara íleggjarar at hyggja eftir hvat FED og Bank of England hava at siga frá seinastu rentifundunum. Eisini koma brúkaraálitistøl úr USA. Hósdagin er marknaðiurin í USA stongdir orsaka av heilidegi.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1331,74 | -4,90% |
| Alheims partabrøv | 7908,11 | -2,07% |
| Atlantic Petroleum | 1940,00 | -19,67% |
| Føroya Banki | 202,00 | -5,61% |
| Eik Banki | 630,00 | -2,48% |
| KB Trygg Eurostoxx | 109,64 | + 0,61% |
| USD | 508,20 | -0,91% |
| JPY | 4,63 | -1,20% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

**Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo**

KAUPTHING BANK